# BP boring við markið vónbrot

*Boringin hjá Sovereign Explorer fyri Amerada Hess samtakið gav so mikið gott úrslit, at Hess møguliga fer at bora á føroyskum øki í ár. Tað fer undir øllum umstøðum at bora ein brunn stutt frá markinum í bretskum øki við boriskipinum West Navion. Boringin verður í øðrum ársfjórðingi*

*Mynd Jan*

**Tað eru misjavnar útmeldingar, sum koma um oljuboringanar á Atlantsmótinum í vetur. Eftir fyrst at hava frætt, at hvørki Statoil ella BP høvdu gjørt nakað fund á føroyska landgrunninum, komu so meira bjartskygdu tíðindini um, at Amerada Hess hevði gjørt eitt fund. Nú koma so ófrættatíðindi um, at enn ein boring hjá BP er eitt vónbrot. Komandi tvey árini fara tí at vera rættiliga avgerandi fyri framtíðina hjá Atlantsmótinum og harvið eisini eini komandi føroyskari oljuvinnu**

OLJULEITING Á ATLANTSMÓTINUM

*Jan Müller*

Søgurnar, sum hava gingið um, at spennandi brunnurin hjá BP, Assynt beint við føroyska markið, er turrur, verða nú eisini umrøddar í oljublaðnum Upstream. Sambart blaðnum14. desember var boringin í tí mest eftirspurda blokkinum á bretskum øki í seinasta (19.) útbjóðinarumfarinn, eitt vónbrot. BP og Shell mugu tí til at endurskoða alla sína vitan og meting av jarðfrøðini í hesum økinum, áðrenn tey kunnu bora tann næsta av brunnunum, sum tey hava bundið seg til í teiginum 204/18. Assynt varð mett at vera eitt sokallað "low risk prospect" tvs. eitt øki, har góður møguleiki var fyri at finna olju, tí tað líktist nógv jarðfrøðini, har verandi keldur Foinaven og Schiehallion liggja nærhendis. Tí verður hildið, at skeivu metingarnar eru eitt stórt afturstig fyri bæði BP og Shell. Møguliga ger tað sama seg galdandi í hesum brunninum sum tað, ið hendi við boringini hjá somu feløgum á føroyska økinum. Hóast oljuspor var Svínoyarbrunnurin eisini eitt vónbrot. Og nú báðir brunnarnir hava bygt á royndirnar og jarðfrøðina í sambandi við Foinaven og Schiehallion í grannalagnum, eru feløgini noydd til at fara aftur til tekniborðið og endurskoða sín seismikk. Helst hava báðar miseydnaðu boringarnar kostað oljufeløgunum einar 400 til 500 mill. kr. Svínoyarbrunnurin einsamallur mundi kosta einar 250 mill. kr. Hóast BP er risastórt felag, sum borar kring allan heim, so munnu hesar "burturspiltu" milliónirnar kortini hava sett í gongd ristingar í fyritøkuni, sum annars hevði mett nettupp hesar báðar brunnarnar á Atlantsmótinum fyri sikkur mál. At tað eisini varð sett arbeiðsbólkur til at fara undir at fyrireika eina skjóta framleiðslu frá báðum brunnunum sigur heldur ikki so lítið um, hvussu vísir teir hjá BP vóru í síni søk.

## Bora fýra brunnar

BP og Shell hava bundið seg til at bora fýra brunnar aftrat í hesum báðum økjunum. Tveir í loyvinum á føroyska landgrunninum og tveir í loyvinum bretsku megin markið. So tað er greitt, at serfrøðingarnir fara at hugsa seg sera væl um, áðrenn tað aftur verður sett út í kortið. Fyri leitingina við Føroyar má sigast, at hetta er óheppið, tí tað var nettupp gitt, at eitt BP fund í økinum fór at skunda undir komandi nýggja framleiðslu. Nú verður tann ætlanin skotin nakað væl út í framtíðina. At feløgini kortini hava vónir til økið er møguliga lønanndi fundið hjá Hess í økinum eitt prógv um. Men heldur ikki í tí førinum er nøkur vissa um, at talan er um eitt rakstrarverdugt fund. Nú verður so bíðað eftir, at Hess skal bora í bretskum øki næsta ár. Eisini verður í oljuvinnuni bíðað við spenningi eftir komandi boringum hjá Texaco og Phillips, eisini í bretskum øki skamt frá markinum.

## Phillips borar neyvan í ár

Fyri føroyingar hevur tað stóran áhuga, um oljufeløg fara at bora beint hinumegin markið í hesum árinum. Roknað verður við, at Hess fer at bora men spurningurin um Phillips fer at bora er meira óvissur. Sosialurin hevur fingið upplýst frá vælvitandi keldum, at Phillips sum eisini samstarvar við Statoil í bretskum øki, neyvan fer at bora í ár. Ein orsøkin sigst vera, at felagið, sum annars ætlaði at bora í ár, eftir Hess fundið hevur gjørt at av kanna seismikk og økið av nýggjum. Helst er tað so, at Phillips hevur hugt eftir somu strukturum sum feløgini á føroyska økinum gjørdu men einki funnu. Tvs. at neyðugt verður at fara longur niður í undirgrundina við borinum og tí má seismiska arbeiðið eftir øllum at døma gerast umaftur. Lynnda Robson, leiðari á kunningardeildini hjá Philips í Bretlandi sigur, at tey ikki í løtuni hava nakra boriætlan klára. Hon vísir annars á, at arbeitt verður við at leggja Philips og Conoco saman, og helst fara partaeigararnir at taka støðu til tað í februar. Síðani skal málið fyri amerikanska myndugleikar, so tað samanleggingin verður neyvan verureleiki fyrr enn seint í heyst. Hon viml tí ikki siga, um ein samanlegging fer at hava ávirkan á áhugan hjá Philips á Atlantsmótinum.

## Hess borar í øðrum ársfjórðingi

Ben Arabo frá Amerada Hess sigur, at teir helst fara at bora í breskum øki í øðrum ársfjórðingi í ár. Hetta verður ein brunnur, sum má metast sum ein avmarkingarbrunnur til fundið, ið Hess hevur gjørt á føroyska landgrunninum. Teir skulu brúka West Navion til uppgávuna. Sosialurin skilur frá oljukeldum í Aberdeen, at Amerada Hess hevur gjørt av at bora í føroyskum øki í ár eisini. Men tað vil Ben Arabo hvørki vátta ella avsanna. Tað skilst, at hetta er ikki ómøguligt. Hann dugir annars ikki at siga, um teir fara at servicera boringina í bretskum øki frá føroyskum veitarum. Talan er um eina bretska boring, so tað merkir, at veitararnir verða úr Skotlandi. Men Hess arbeiðir við eini ætlan, har felagið kann veita vørur og tænastur í arbeiðinum vestan fyri Hetland frá føroyskum støðum.

Sosialurin skilur annars, at Hessfundið nýtist ikki at vera nakað stórt fund. Porøsiteturin tvs. hvussu væl olja kann renna úr steininum er ikki tann allarbesti og tí skulu aðar fortreytir helst verða til steðar fyri at feltið kann liva upp til at gerast ein lønandi framleiðsla. Men tað er so óvist enn.

Hvat hinum stóra fyristøðufelagnum, sum hevur leitiloyvi í brestkum í, Texaco, so er ógreitt, hvat teir fara at fyritaka sær. Men tað ljóðar, at teir royna at fáa Sovereign Explorer til uppgávuna. Ein av teirra lisensum liggur beint síðuna av loyvinum hjá Agip og Føroya Kolvetni. Texaco er annars eisini við í einum av loyvunum hjá Amerada Hess í bretskum øki eisini.



# BP ikki mist vónina

**-men vit mugu til at byrja av nýggjum og endurskoða allar metingarnar og seismikkin. Eg havi ongantíð sæð jarðfrøðingar taka so dyggiliga feil sigur John Thorogood, boristjóri**

OLJULEITING Á ATLANTSMÓTINUM

*Jan Müller*

BP hevur ikki mist vónina til nýggj oljufund á Atlantsmótinum (tvs. økinum vestan fyri Hetland og eystan fyri Føroyar). John Thorogood, boristjóri hjá BP sigur, at teir nú fara at endurskoða metingar sínar. Og so skjótt teir hava gjørt tað fara teir "to join the party again" sum hann málber seg. Tvs. at vera við aftur.

Tað er einki dulsmál, at John og hini BP fólkini eru vónsvikin. – Eg kann bara úttala meg sum borari, og út frá tí kann eg bert siga, at jarðfrøðingarnir hava gjørt eitt stórt mistak. John Thorogood vísir annars til tað, sum varð sagt á oljuráðstevnuni herfyri, um at jarðfrøðin vísir seg at vera nógv meira kompliserað enn mett. – Vit bygdu okkara vónir á seismiskar upplýsingar, og vit vóru rættiliga avgjørd um, at hetta var tað rætta. Tá so nakað heilt annað vísir seg mugu vit fara aftur til byrjanina og fáa nýggjar upplýsingar at byggja okkara nýggju metingar á.

John Thorogood hevur arbeitt í oljuleiting alt sítt lív og hevur havt tætt tilknýti til jarðfrøðingar. – Eg havi ongantíð sæð teir so dyggiliga tiknar á móti sum hesaferð - av nøkrum, sum teir als ikki høvdu roknað við at síggja.

## Vóru ov vísir í seismikkinum

– Trupulleikin er, sigur hann viðari, at bæði Statoil, Hess og vit sjálvir hava als ikki ivast í seismikkinum men hevur tað víst seg, at vit allir lutvíst hava tikið feil. BP hevur brúkt nógvar pengar kring allan heimin, har seismikkurin hevur víst seg at vera misvísandi. Hetta hevur ikki bara nakað við arbeiðið á tekniborðinum at gera. Tað er heilt frá granskingarbyrjan. Vit mugu til at lesa seismikkin av nýggjum, fáa nýggjan seismikk til vega og viðgera hann soleiðis, at vit júst vita, hvat vit gjørdu skeivt og hvussu vit síðani kunnu brúka hann, til at finna rætta staðið at bora í næstu brunnunum.

Bretski boristjórin sigur víðari, at felags hóttanin, sum øll oljufeløg hava at dragast við, er, hvussu tey skulu skilja seismisku tøknina. Tað vísir seg, at nógv fólk detta í eina fellu. Hann samanber hetta við at brúka seismikkin at leita eftir olju við at hyggja gjøgnum eina sera sterka sjóneyku. Tú heldur, at tú harvið kanst síggja tað tú leitar eftir meira klárt – men um tað tú hyggur eftir er defekt, so er alt tað tú hyggur at ein størri defekt. Og tað kann vera, at vit hava trýst tøknina longur fram enn hon loyvir okkum at fara. At vit seta størri vónir til hana, enn hon í veruleikanum gevur okkum orsøk til.

Tað vit funnu ella uppdagaðu kom óvart á. Tað, sum vit hildu vera sera lovandi, sær út til at vera nógv meira torført enn vit hildu. Vit roknaðu við einum løttum vegi til sigurs, men bráddliga verður tað nógv meira kompliserað.

John Thorogood heldur fyri, at við lækkandi oljuprísum vilja feløgini gera so djúpt er antin talan um gass ella um olju, sum er ring at fáa upp. 170 metrar lag við olju og gassi er tó nógv viðgongur John Thorogood, sum tó heldur tað mest umráðandi vera, at Hess skal bora tríggjar brunnar aftrat, ein her og tveir í bretskum øki. -Um alt fyri at brúka pengar til seismikk, áðrenn tey fara inn í eina dýra boring. Tvs. at tey vilja tryggja sær, at tey leita á rætta staðnum frá byrjan.

*John Thorogood, boristjóri hjá BP sigur seg ongantíð hava sæð jarðfrøðingarnar hava tikið so dyggiliga feil sum við boringunum hjá BP í báðum boringunum á Atlantsmótinum í fjør*

*Mynd Jens K. Vang*

## Oljan rann á dekkið

Vit spurdu hann, um støðan í Falklandsoyggjunum, kann endurtaka seg her hjá okkum. Har raktu teir eisini við oljuspor og øll hildu seg verða blivin oljumillionerar. Tað vísti seg kortini, at har var ikki olja í rakstrarverdugum nøgdum.

– Tað veit eg ikki. Tá vit tóku boriprøvan í Svínoyarbrunninum upp rann olja á dekkið. Men tað var tí, at eina ferð í fortíðini var olja runnin gjøgnum løgini vit boraðu ígjøgnum og nakað hevur so ligið eftir í einum lumma, meðan restin er runnin burtur onkunstaðni. Vit vita bara ikki hvar. Tað vísti tó, at her hevur verið ein virkin oljuskipan.

- Onkur heldur Hessfundið er at meta sum ein gáva til føroyingar. Er tú samdur í tí?

- Tað er ringt at svara. Fundið liggur sera djúpt. Eg havi ikki sæð data frá brunninum. Men 4200 metrar er rættiliga djúpt, tá hugsað verður um, at øll framleiðslan vestan fyri Hetland kemur upp frá 2800 metrum. Tað sýnist fyri mær at vera sera djúpt at fara undir framleiðslu á 4200 metrum. Tá tú kemur metrar frá markinum, so tað kann merkja, at struktururin teir siggja heldur fram inn á bretskt øki. At nakað er funnið kann merkja, at man kann bora bretsku megin fyri at finna út av, hvussu stórur struktururin er og út frá tí testa og finna út av, hvat talan veruliga er um.

- Eg ivist ikki í, at teir fara at brúka nógva tíð til at finna fram til, hvar rætta staðið er at bora og fara teir so at brúka tann brunnin til at vita, hvussu stórt eitt felt kann vera. Og hvussu oljan flýtur.

Tá vit spyrja bretska boristjóran, hvat hann heldur eitt av nýggjárynskjunum hjá føroyingum kundi verið sigur hann, at tað kundi verið, at Agip finnir ein boripall og borar ein væleydnaðan brunn í ár, og at Amerada Hess borar ein avmarkingarbrunn í fundinum teir hava gjørt.

- Tað er ringt at siga. Eg havi ongantíð sæð jarðfrøðingar hava so rangt sum vit hava í hesum báðum boringunum. Tað er ikki bara tað, at vit hava fingið vónbrot, men at vit hava fingið so stór vónbrot. Tað er ikki bara tað, at vit hava mist vónina um at finna olju, men at vit hava mist vónina um at finna nakra olju. Tað er heilt nýtt, at vit hava fingið so stór vónbrot, sigur John Thorogood.

## Små fund

John Thorogood leggur tó dent á, at hann er ikki jarðfrøðingur men borimaður. Hann vísir á, at hyggja vit at økinum vestan fyri Hetland so hava øll oljufeløgini gjørt fund men tey flestu eru ov smá. -Tá vit hava testað tey vísa tey seg als ikki at kunna renna nóg væl. Uttan eina sokallaða flowtest ber tí ikki til at siga nakað við vissu um eina oljuframtíð við Føroyar. Tí má stóra vónin hjá føroyingum vera, at Amerada Hess borar ein avmarkingarbrunn næsta ár og at man fær tíð til at testa hann. Hess boraði bara 500 teir fara at bora her er óvist eftir tí eg havi frætt. Men ein av boringunum verður ein avmarkingarbrunnur, tí teir vita helst, at feltið gongur inn á bretskt øki. So eg vil fegin vera bjartskygdur til frama fyri Hess og halda, at ein av trimum boringunum næsta ár verður at vita, hvat man hevur fatur á í føroyskum øki.

*Eitt av nýggjársynskjunum hjá føroyingum átti at verið, at Agip finnur ein boripall og borar ein væleydnaðan brunn í ár og at Amerada Hess borar ein metingar- og avmarkingarbrunn í sambandið við fundið á landgrunninum*